# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Stendur amerikanska trýstið við, kunnu vit ikki halda avtalurnar, sum vit nú hava gjørt við umheimin*

*(norðurkoreanskur talsmaður)*

# Danskar ferðaskrivstovur brúka lívshættislig flogfør

**Fleiri flogfeløg, sum danska ferðaskrivstovur brúka, standa á svartalista hjá ES**



Í síðstu viku almannakunngjærdu ES-myndugleikarnir ein lista við nøvnunum á teimum flogfeløgum, sum sambært myndugleikunum eru so vandamikil, at tey hava fingið forboð fyri at flúgva í evropeiskum loftrúmi. Hetta er ikki tann fyrsti listin av hesum slagnum, men tað sermerkta við honum var, at hesaferð vóru øll flogfeløgini í Indonesia komin á listan. Meginorsøkin er, at trygdin í flogførunum er ikki nóg góð.

Men danskar ferðaskrivstovur geva sær eftir øllum at døma ikki far um, hvat ES-myndugleikarnir siga. Eitt nú veit Erhvervsbladet at siga, at tann stóra ferðaskrivstovan My Travel brúkar indonesiska flogfelagið Garuda Indonesia til at flyta síni ferðafólk ímillum høvuðsstaðin Jakarta og frítíðarstaðið Yogyakarta .

Garuda Indonesia stendur á svartalista hjá ES, og talsmaðurin hjá My Travel, Torben Andersen, viðgongur fyri Erhvervsbladet, at tey eiga ikki at brúka flogfør hjá indonesiskum flogfeløgum, og at tað samstarvið steðgar alt fyri eitt.

Ein onnur donsk ferðaskrivstova, InterTravel, hevur eisini brúkt eitt indonesiskt flogfelag, men hevur gjørt av at gevast við tí, nú tað felagið eisini er komið á svartalista hjá ES.

Flestu norðurlendsku ferðafólkini, sum fara til Indonesia, fara til Bali, og hagar flúgva næstan øll við viðurkendum teilendskum, japonskum ella avstralskum flogfeløgum, skrivar Erhvervsbladet.

# Álopin av sínum egnu

**11. september í 2001 vóru sløkkiliðsmenninir í New York hetjurnar hjá Rudolph Giuliani, borgarstjóra, men nú er vátt komið í reiðrið**

Rudolph Giuliani er ikki borgarstjóri í New York longur. Tað merkir kortini ikki, at hann hevur mist hugin til at stýra. Heldur tvørturímóti, tí nú ætlar hann sær at sleppa at stilla upp til forsetavalið næsta ár sum valevni hjá republikanarunum.

Men hann fær óvæntaða mótstøðu, tí júst sum valstríðið er um at byrja, hava hansara gomlu hetjur, sløkkiliðsmenninir í New York, sent út ein sjónbandsfilm, har teir koma við fleiri álopum á fyrrverandi borgarstjóran.

Millum annað endurtaka sløkkiliðsmenninir ta gomlu ákæruna um, at sum borgarstjóri hevði Rudolph Giuliani ábyrgdina av, at 121 fólk doyðu, tí hann var ov skjótur at geva boð um at steðga bjargingararbeiðinum í leivdunum av World Trade Center.

Sjálvur vísir Giuliani skuldsetingunum aftur. Hann vil vera við, at fakfelagið hjá teimum amerikonsku sløkkiliðsmonnunum er trúgvur stuðul hjá demokratiska flokkinum.



*Rudolph Giuliani. 11. september í 2001 vóru sløkkiliðsmenninir hansara hetjur. Nú venda teir honum bakið*

## STUTT SAGT

### Bað um umbering

Bretska kringvarpið BBC hevur biðið Elizabeth drotning og amerikanska fotografin Annie Leibovitz um umbering fyri at hava borið skeiv tíðindi um tær báðar. BBC vildi vera við, at drotningin rýmdi frá einari myndatøku, tí Annie Libovitz bað hanan taka krúnuna av høvdinum. BBC vísti eisini myndir av drotningini á veg út úr hølunum, men nú viðgongur støðin, at myndirnar vórðu tiknar undan myndatøkuni, og at tíðindini sostatt vóru skeiv.

### Tað var rasisma

Í Fraklandi hevur landsrætturin staðfest, at tann heimskenda fyritøkan L'Oreal breyt lógina um rasismu, tá hon søkti eftir kvinnum til at marknaðarføra hársápuna Fructis Line. Í lýsingini eftir kvinnunum stóð, at tær skuldu vera tað, sum fyritøkan kallar BRB. Tað er ein stytting fyri Blanc-Bleu-Rouge og er eitt rasistiskt orðalag fyri eina hvíta, franska kvinnu. L'Oreal hevur fingið bót, og nøkur starvsfólk fingu treytaða fongsulsrevsing, men fyritøkan sigur, at hon frer at kæra dómin.

### Søkja skjól

Fýra fólk úr Norðurkorea, tvey vaksin og tvey børn, hava leitað sær inn á donsku sendistovuna í vietnamska høvuðsstaðnum Hanoi, har tey hava biðið um hjálp til at sleppa til Suðurkorea. Uttanríkisráðið í Keypmannahavn hevur biðið flóttafólkadeildina hjá ST kanna, um fólkini kunnu sleppa til Suðurkorea, skrivar Ritzau.